

TIPS FRÁ EYDNU
eydna@sosialurin.fo

**Góð ráð frá Mirjam til jólaborðhaldini**
– Tað heilt stóra nú, um tú skalt gera okkurt eyka burturúr, eru falskar eygnavippur. Make up Store hevur nógvar ymsar eygnavippur, bæði stórar 60'ara vippur og meiri nattúrligar, sum bara leingja eitt sindur egnar vippur. Mirjam viðmælir eisini eygnavippur við smáum similidiamantum á til jólaborðhaldini.

*Prei: Til ber at fáa vippurnar settar á inni í handlinum, um tú heldur tað vera trupult.*

Eygnavippur við diamantum, kr. 160,-







*Mirjam (til vinstru) og Hanna eiga og reka Make-up Store í Havn*

**FAKTA UM MAKE UP STORE:**
Smyrslið var upprundaliga gjørt til make-up artistar, men tað varð so vælumtókt, at tað eftir eini tíð eisini varð framleitt til vanliga sølu. Slagorðið er »Ein heimur av litum«, og hugsanin er, at fólk skulu hava tað stuttligt og tora at eksperimentera. Til ber til at keypa blandingsevni, soleiðis, at putur kann gerast til foundation, putureygnaskuggar kunnu gerast til kremeygnaskuggar, kinnareytt kann gerast til lipgloss o.s.v. Alt kann sostatt nýtast til alt. Til ber at fáa persónlig ráð og vegleiðing um, hvørjar vørur hóska til tín. Prísflokkurin er miðal. Handilin letur upp í Kongagøtu 6 í miðbýnum í Havn.

# Ein heimur av litum

LEYGARDAGIN 4. DESEMBER LETUR **MAKE-UP STORE** UPP Í **HAVN**. VIT HAVA TOSAÐ VIÐ **MIRJAM REINERT OLSEN**, KOSTMETOLOG, MAKE-UP **ARTIST** OG STYLIST, SUM SAMAN VIÐ **SYSTUR** SÍNI **HANNU REINERT DAVIDSEN** SKAL REKA **HANDILIN**. VIT HAVA FINGIÐ NØKUR **GÓÐ**






**Góð ráð frá Mirjam um varrarnar**
– Sterkir litir á varrunum eru inn. Íblásturin er frá 40'unum, og litirnir eru alt frá sterkt reyðum yvir í bordoux.

***Prei:** Fyri at fáa varrastiftina til at halda longri ber til at tekna allar varrarnar við einum varrablýanti í sama liti, sum varrastiftin, og síðani smyrja varrastift útyvir. So heldur liturin nógvar ferðir longri.*

***Prei:** Reglan hevur verið, at um eyguni eru nógv smurd, skulu varrarnar verða bleikar og øvugt. Men í ár ber til at smyrja bæði eygu og varrar við sterkum litum. Tá skal tó ikki vera nógv kinnareytt.*

Varrastift, kr. 179,-
Varrablýantur, kr. 145,-

**Vit á VIKUSKIFTINUM hava roynt nakrar av vørunum í Make up Store, og vit eru púrasta follin fyri hesum:**

- ☆ **1** Mascara Max Lashes, sum hóskar væl til gerandis, men smyrt tú fleiri ferðir á, verða vippurnar tjúkkar og veitsluklárar
- ☆ **2** Cover All Mix, dekk »stiftin« við trimum ymsum litum, sum bæði fjala reyð frábrigdi á andlitinum OG myrkar randir undir eygunum. Fantastiskt innanundir foundation.
- ☆ **3** High Tech Lighter, sum er kremutur og skyggjandi, og sum kann nýtast til kinnar, eygu, varrar, nasarygg – you name it. Frískleiki til húðina í eini dós




**Góð ráð frá Mirjam til eldri húð**
– Eldri húð hevur rukkur og linjur, og skal tí ikki at smyrjast ov nógv. Ov nógv smyrsl framhevjar rukkurnar. Um tú nýtir foundation, skal tað tí ikki verða ov tjúkt – eitt gott ráð er at blanda andlitskrem uppí.
– Eygnaskuggar skulu ikki vera ov skyggjandi, tí tað ger linjurnar meiri sjónligar. Mattir eygnaskuggar eru bestir til eldri húð.
– Av tí, at húðin við tíðini missir fríska litin, klæðir tað væl eldri kvinnum at nýta rosa og fersken litt kinnareytt, fyri at endurskapa glóðina í húðini.

Foundation, kr. 275,-
Blush, kr. 175

**Góð ráð til vetrartroytta húð**
– Reinsa húðina dagliga og nýt skrubbikrem einaferð um vikuna, fyri at halda húðina fríska.
– Um veturin er húðin ofta matt, og hon sær fрískari út, um smáir glitrandi partiklar verða smurdir á hana. Highlitari á kinnabein, nasarygg, høku og pannu er ein góð loysn, eins mineralputur og blush kunnu gera undurverk.

Prei: Vel foundation eftir húðarlitinum -hvørki myrkari ella ljósari, og nýt dekkstift til at gera húðina einslitta.

Reinskúm, kr. 195,-
Sparkling powder, kr. 260,-
Mineralputur, kr. 440,-
Concealari, kr. 295,-










**Góð ráð frá Mirjam um vetrarsmyrslið**
– Um veturin kanst tú smyrja tær ógvusligt og nýta sterkar litir.
– Vetrarsmyrslið í Make up Store eitur Frozen Diamond. Tað eru kaldir, klárir litir við nógvum skyggjandi og glitrandi effektum.
– Smokey eyes er tó altíð vakurt, tí tað framhevjar eyguni.

*Prei: Ofta verða smokey eyes sett í samband við svartar/gráar litir, men til ber eisini til at nýta t.d. blátt ella brúnt. Smokey eyes merkir, at sminkan er myrk, og verður tónað út, soleiðis, at tað ikki eru sjónligir kantar.*

*Prei: Til smokey eyes ber til at tekna alt eygnalokið við eini bleytari kohlstift, leggja eygnaskuggar omanyvir og síðani tóna út. Tá heldur liturin longri.*




Mascara, kr. 165,-
Kohlstift, kr. 145,-
Eyedust, kr. 145,-
High tech lighter, kr. 175,-
micro shadow, kr. 145,-